Lýsið har lýsingarnar síggjast

Leys størv í Føroyum & uttanlands

Fyritøkur og stovnar kunnu nú keypa pláss til starvslýsingar sínar á føroyska portalinum - www.portal.fo og í blaðnum Sosialinum

Føroyski Portalurin, ið er nýggja navnið fyri Olivant.fo hýsir starvslýsingum hjá fyritøkum og stovnum, sum hava áhuga í, at starvslýsingar teirra skulu røkka enn fleiri lesarum. Vanliga vitja upp í 10.000 brúkarar www.portal.fo hvønn dag.

Lýsingarprísur pr. starvslýsing, galdandi frá at lýsingin er løgd út á føroyska Portalin:

1 viku	kr. 1.000,-
2 vikur	kr. 1.500,-
til freistin er úti	kr. 2.000,-

Tekstur (word-fílur) og møguliga búmerki skal sendast viðheft til teldupostadressuna: lysing@sosialurin.fo

Eru spurningar og/ella ivamál, eru tit altíð vælkomin at senda teldupost til:

lysing@sosialurin.fo
ella ring til
Finnbjørg ella Anju
Sosialurin 311820

Bilur við skaða til sølu

Merki: Nissan Primera LX 1.6, 4 hurðar, sedan
Árg.: 1995
Km.: 115.000

Bilurin er skaddur í høgru síðu.
Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Magni Petersen, sýnsmaður
Tlf.: 345600 – lokal 728
Fax: 345607

at hitta mánadag til hósdag millum kl. 08.30 – 10.00 og fríggjadag 08.30 – 16.00.

Brúktur BMW 523i

bilurin er í sera góðum standi

BMW 523i

Árg. 03/96 km. 108.00 kr. 280.000,-
Bilurin er í sera góðum standi.
Bilurin hevur nógva orginala eykaútgerð, so sum Anti spin, klima aut., 6xcd boks, fjarst. sentrallás, sleipi krók, tví deilt setur aftan, ski posa, alu felgur og eyka sett av felgum v/dekkum v.m. (eyka útgerð fyri ca. 75.000,-)

Bilfríðkan
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

Sambandsflokkurin

Vága valdømi

Hjartans tøkk fyri hvørja einastu atkvøðu, ið tilsamans gjørdi Sambandsflokkin til nógv tann størsta flokkin í Vága valdømi
– og størsta flokk í landinum

Ein serstøk tøkk til tykkum 311, ið stuðlaðu mær persónliga

Marjus Dam

vaillant

Galvaniseraðir viðfestisvognar

Eykalutir, útgerð, søla og service. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!

Sosialurin - 311820

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893

ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi

LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar

ADC

BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

Sosialurin
Sosialurin i

Brúktur BMW 316i

bilurin er í góðum standi

BESTA BRÚKTBILAFIGGING Í LANDINUM SÍ HEIMASÍÐUNA WWW.BILFRIDKAN.FO

BMW 316i E36

Árg. 10/94 Km. 228.000 Lit hvítur
Útgjald bert 28.000,- / 138.000,-
er í góðum standi

Bilfríðkan
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

Set sa l ning r



lasti er
goy sl

Slitster r iðl a al s r r

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

Lýsing

Heilafelagið takkar hjartaliga fyri stuðulin í sambandi við tiltakið í SMS 10. og 11. mai.

Nevndin

Frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Føroya Skipara- og Navigatørfelag takkar hjartaliga limum sínum og øllum teimum, sum hvør á sín hátt hevur stuðlað felagnum í stríðnum fyri rættindum, sum limirnir so dyggiliga hava uppiborið.

Sum formaður vil eg persónliga takka nevndini fyri dyggan stuðul og gott samanhald í øllum stríðnum.

v/meg sjálvan og Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Ellintur M. Abrahamsen

Hægri lestur á Føroyamálsdeildini 2002–2004

Í september byrjar exam.art.– og cand.phil.–lestur í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.

Exam.art. í norðurlendskum,
serliga føroyskum máli og bókmentum
Lesturin tekur tvey ár og er skipaður helvt um helvt í ein máltátt og ein bókmentatátt, umframt vísindaástøði og samskifti.

Endamálið við lestrinum er at ogna sær kunnleika til føroyskt mál og bókmentir í eldri og nýggjari tíð. Onnur norðurlendsk mál og norðurlendskar bókmentir eru partar av lestrinum.

Upptøkutreytir eru students- ella HF-prógv. Onnur samsvarandi útbúgving kann góðtakast eftir umbøn í hvørjum einstøkum føri.

Cand.phil. í norðurlendskum,
serliga føroyskum máli og bókmentum
Námið er tvey ára framhaldslestur fyri tey, ið frammanundan hava lokið exam.art.-prógv í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum, og veitir serkunnleika í útvaldum málslig-um og bókmentaligum evnum.
Deildin arbeiðir við ætlanum um BA-útbúgving sum ávegis prógv til cand.phil.

Upptøkutreyt er exam.art.-prógv í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.

Umsóknarfreistin til bæði námini er 1. juli 2002.

Nærri upplýsingar og umsóknarbløð fáast á:

Føroyamálsdeildin
Fróðskaparsetur Føroya
V. U. Hammershaimbs gøtu 16
Postrúm 272
FO-110 Tórshavn.
Tlf. 352520
Fax. 352521

og á www.setur.fo

Samfelagsmøtir í Vági á Hvítusunnu

Fríggjakvøldið	kl. 20.00	Bønarmøti	í Betel
Leygardagin	kl. 16.00	Uppbyggingarmøti	í Ítróttarhøllini
–	kl. 20.00	Evangeliskt møti	–
1. Hvítusunnudag	kl. 10.00	Breyðbróting	–
–	kl. 16.00	Uppbyggingarmøti	–
–	kl. 19.00	Evangeliskt møti	–
2. Hvítusunnudag	kl. 10.00	Uppbyggingarmøti	–
–	kl. 15.00	–	–
–	kl. 20.00	Evangeliskt møti	í Betel

Barnamøti í VB-húsinum:
1. Hvítusunnudag kl. 16.00

Opið hús verður í Betel:
Leygarkvøldið og 1. Hvítusunnudag kl. 22.00.

Øll eru hjartaliga vælkomin

Samkoman í Betel

Lærugreinaráðgevar

Starvið
Í Mentamálastýrinum/Landsmiðstøðini eru nakrir tímar sum ráðgevar leysir at søkja til setanar frá 1. august 2002.

Ráðgevingin fatar um lærugreinirnar **týskt, danskt, støddfrøði og alis-/evnafrøði.** Dentur verður lagdur á, at arbeitt verður í tvørgreinaligum høpi, og møguleiki er at søkja eina ella fleiri lærugreinir.

Samanlagt eru 15 lønartímar um vikuna at søkja (ein lønartími svarar til umleið 1 1/2 fyrisitingartíma). Vanliga verður ráðgevi settur við 6 til 12 lønartímum um vikuna.

Førleikakrøv
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein/-um og starvsøkjum, starvið fatar um. Væntað verður, at lærugreinaráðgevin hevur førleika í og er hugaður at nýta KT í ráðgevastarvinum.

Setanar- og lønartreytir
Lærugreinaráðgevar verða settir eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag. Tey, ið sett verða, skulu viðvíkja írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum.

Umsókn
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 31. mai 2002.

Gjøllari upplýsingar fáast frá stjóranum á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

Mentamálastýrið og Landsmiðstøðin

***Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur stýrið uppgávur, ið viðvíkja kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Landsmiðstøðin** er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingaramboð, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálastýrinum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri fakligum, námsfrøðiligum skeiðum fyri lærarum og skúlamyndugleikum.*

AUTO
- ag n tt-
- lt gnið-
ra il
- ring
S L
S